## Telefonbókin 2007 komin

Telefonbøkurnar koma út í viku 11, og verða liðugt útbornar um mánaðarskiftið mars/apríl. Borið verður út til allar **fastnetskundar** í Føroyum, og eru tað fleiri enn 26.000 bøkur, ið skulu berast út. Postverk Føroya hevur útberingina um hendi.

Fyri at gera tað lættari at finna upplýsingarnar í bókini, hevur Føroya Tele í ár valt at lýsa innihaldsyvirlitið á forsíðuni. Vónandi verður telefonbókin hent at hava í árinum 2007, sum tykist gerast eitt spennandi ár á fjarskiftisøkinum.

Fartelefonkundar í Føroyum fáa ikki bókina sendandi, men hesir hava møguleika at ogna sær eintøk í Telebúðunum kring landið fyri 50,- kr. eintakið. Eins og undanfarin ár, eru Teletíðarkundar ikki upptiknir í telefonbókini.




## Íløga til íløt

Rúsdrekkasøla Landsins noyðist at gera íløgur, so hon kann taka ímóti tómum øl- og sodavatnsblikkum, og tí hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum biðið um 1,5 mió. krónur í eykajáttan til Rúsdrekkasøluna. Pengarnir skulu brúkast til móttøkuskipan og eina skipan til at kroysta blikkini saman, og allar deildirnar hjá Rúsdrekkasøluni skulu hava slíkar skipanir. Loyvið at selja drykkir í einnýtsluíløtum kemur í gildi tann 1. mai.

Lis Nolsø, leiðari

# Vit fáa ein supergóðan stovn

**Økingin á ansingartørvinum í Nólsoy hevur verið ógvuslig síðani ansingin byrjaði sum ein royndarverkætlan í 1999. Tá vóru 8 børn í ansing. Nú nýggi og stásiligi barnagarðurin verður tikin í nýtslu mánadagin, er talið av børnum á stovninum - frá vøggustovu upp í frítíðarskúla - komið upp á 34. Hetta verður ein kollveltandi betring av umstøðunum, bæði hjá starvsfólki og ikki minst børnum, sigur Lis Nolsø, leiðari**


*Mánadagin sleppa m.a. hesi børnini í nýggj og snotilig hølir. Tey gomlu vóru blivin alt ov trong, men nú verða umstøðurnar hjá bæði børnum og starvsfólki fyrsta floks.*

**BARNAANSING**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað eru ikki so ógvuliga nógv ártíggir síðani, at almenn barnaansing var eitt ókent fyribrigdi. Skuldi mamman burtur eitt ørindi, so var tað omman ella grannakonan, ið tók sær av at ansa børnunum ta løtuna.

Men tann tíðin er farin - og um tað er gott ella ringt, er upp til hvønn einstakan at meta um.


*Lis Nolsø, leiðari fyri barnaansingini í Nólsoy*

Í øllum førum eru tíðirnar nú soleiðis skrúvaðar saman, at kvinnum stendur frítt í boði at søkja út á arbeiðsmarknaðin, og tað munnu tey flestu vera fegin um. Hetta skapar so aftur ein tørv fyri almennari barnaansing, nakað, ið fyrst merktist í høvuðsstaðnum, men sum í dag man vera at finna í nærum hvørjari bygd í landinum.

Í Nólsoy gjørdist hesin tørvur eyðsýndur seinast í 90-árunum, og í 1999 gjørdi bygdarráðið av, at seta á stovn eina royndarskipan við barnaansing í bygdini.

Byrjað var í Missiónshúsinum. Í fyrstani varð lítið og einki gjørt við at rigga bygningin til endamálið, men við tíðini er húsið innrættað so frægt, sum til ber til ansing av børnum. Havast skal eisini í huga, at talan var um bæði vøggustovu og barnagarð av fyrstan tíð, og seinni er frítíðarskúli eisini í hølunum.

Tað byrjaði í tí smáa við einum 8 børnum í alt, og tá vóru hølisviðurskiftini ríkiliga nøktandi, tá hugsað var um pláss. Men í dag er alneyðugt við størri og eisini meiri nútímans hølum, tí í dag er talið á børnum heili 32 - og um stutta tíð 34. So sum er ganga børn og starvsfólk mestsum uppi á hvørjum øðrum.

### Góðar treytir

Um miðan 2003 byrjaðu samráðingar millum Nólsoyar og Tórshavnar kommunur um treytirnar fyri einari møguligari samanlegging. Hesin spurningur hevði verið uppi og vent seinnapartin av 90-árunum, men tá var tíðilig mótstøða í Nólsoy móti at leggja kommunurnar saman, so tá bleiv ikki gjørt annað við málið, enn at hava ein kunnandi fund í Nólsoy fyri bygdarfólkinum, har umboð fyri Tórshavnar kommunu greiddu frá um samanleggingarnar, ið høvdu verið millum eitt nú Argir, Kollafjørð og so Havnar kommunu.

Í 2003 sýntist so tíðin tó vera komin til at fara meiri seriøst til verka. Partvís var tað nógva tosið millum landspolitikararnar um at leggja alt fleiri økir út á kommunurnar, og partvís gekk tosið dúgliga aftur og fram um tað rætta í at tvinga kommunur at leggja saman.

Nólsoyar kommuna var sjálv ikki illa fyri fíggjarliga, men ætlaða útleggingin av eldraøkjunum til kommunurnar mundi vera ein avgerandi orsøk til, at eitt samt bygdarráð samtykti, at fara undir realitetssamráðingar við Havnina um samanlegging.

Tá so úrslitið av hesum samráðingum var greitt, tók ein stórur meiriluti av